# BÝRÁÐSFUNDUR

**Dagfesting:** 30.11.2015 kl. 19:00

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Anna Brattaberg Samuelsen
Dánjal Bjarkhamar
Heri Hjelm
Poul W. Augustinussen
Tórður Poulsen
Eyðbritt Krosslá

Vara limir: Olgar Mortensen

Ikki møtt: Conrad Gaard Joensen, fráboðað

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 24/15 | 15/00152-7 | Fráboðan um fráveru og at fáa eykaumboð inn | 2 |
| 25/15 | 15/00217-9 | FÆ2016 fyri VK | 2 |
| 26/15 | 15/00091-28 | Uppskot til eykajáttan 2015 | 4 |
| 27/15 | 13/00245-11 | Fremja endaliga sølu av grundøkið undir bilhúsum í Líðini | 4 |
| 28/15 | 15/00250-2 | Páls Høll søkir um stuðul til undirlendi | 5 |
| 29/15 | 15/00270-2 | Nýggj tannlæknaskipan | 5 |

## 24/15 Fráboðan um fráveru og at fáa eykaumboð inn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.11.2015 | 24/15 | 15/00152-7 |

Conrad Gaard hevur í telduposti dagfestur 09. november 2015 boða frá, at hann ikki kann møta til fleiri býráðsfundir í ár (2015), og møguliga heldur ikki fundin í januar 2016. Conrad hevur boða Olgar frá, og vil fegin hava at hann møtir í sítt stað hetta tíðarskeiðið.

**Vágs Býráð 30. november 2015:**
Einmælt samtykti at játtað farloyvið og at Olgar tekur sætið.

## 25/15 FÆ2016 fyri VK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.09.2015 | 36/15 | 15/00217-9 |
| 10 Havnanevndin | 16.11.2015 | 11/15 | 15/00217-9 |
| 11 Sosiala nevnd | 18.11.2015 | 21/15 | 15/00217-9 |
| 12 Fíggjarnevndin | 23.11.2015 | 59/15 | 15/00217-9 |
| 13 Vágs Býráð | 30.11.2015 | 25/15 | 15/00217-9 |
| 2 Vágs Býráð | 28.09.2015 | 22/15 | 15/00217-9 |
| 3 Mentanarnevndin | 12.10.2015 | 40/15 | 15/00217-9 |
| 4 Havnanevndin | 12.10.2015 | 9/15 | 15/00217-9 |
| 5 Tekniska nevnd | 12.10.2015 | 25/15 | 15/00217-9 |
| 6 Sosiala nevnd | 12.10.2015 | 18/15 | 15/00217-9 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.10.2015 | 40/15 | 15/00217-9 |
| 8 Mentanarnevndin | 16.11.2015 | 50/15 | 15/00217-9 |
| 9 Tekniska nevnd | 16.11.2015 | 33/15 | 15/00217-9 |

Sama skattaprosent og sami barnafrádráttur sum í 2015 (22,95% og 4.000 kr). Í høvuðsheitum kann sigast, at allir rakstrarkostnaðir á 47,036 mió eru mettir út frá bókaðum tølum fyri 8 mðr 2015. Samlaðar inntøkur eru mettar til 54,672 mió og avdráttirnar til 2,3 mió. Eins og undanfarin ár eru ongar íløgur avsettar í fyrsta uppskotinum. Tølini eru hækkaði nógv í mun til undanfarin ár, og stavar tað í høvuðsheitum frá Eldraøkinum (BHS). BHS var avsett sum nettotal í 2015 (útr minus innt), men í 2016 eru útreiðslur og inntøkur avsettar hvør sær (brutto). Avlopið, uttan íløgur, er mett til 7,636 mió.
Leggið merki til, at ongar avtalur fyriliggja viðv. Hamragarði/Eldrasambýlinum og barnatannrøktini tá hetta uppskotið var gjørt. Og at koyring av skúlabørnum til Páls Høll ikki er við.

**FÆ2016, uppskot nr 2 tann 23 november 2015 :**
Barnafrádrátturin á kr 4.000 verður óbroyttur. Skattaprosentið verður aftur lækka, til 22,50%. Eisini er loft á kr 4.000 pr mðr sett á ansingargjøldini. Inntøkurnar eru mettar til 55,588 mió kr,

íløgurnar til 2,750 mió kr, avdráttirnar 2,300 mió kr og RLÚ er mett til 4,169 mió kr. Eldraøki er avsett soleiðis at útreiðslurnar eru ájavnar við afturberingina frá Landinum, men harumframt fær VK leiguinntøkur frá BHS. VK eigur enn Hamragarð/Eldrasambýlið. Hædd er ikki tikin fyri um Løgtingið hækkar botnfrádráttin í kommunuskattinum.

**Fíggjarnevndin 25. september 2015:**
Einmælt samtykt at leggja fyrra uppskot fyri býráðið.

**Vágs Býráð 28. september 2015:**
Einmælt samtykt, at taka undir við uppskotið nr 1.

**Sosiala nevnd 12. oktober 2015:**
Sosiala nevnd heldur at haldast skal áfram at nýmótansgera heilsumiðstøðina.

**Havnanevndin 12. oktober 2015:**
Havnanevndin heldur at peningur eigur at verða settur av til framhaldandi at asfaltera á havnalagnum. Og at atløgubryggjan inni á Oyrunum verður raðfest og at bátahylurin verður endaliga umvældur í komandi ár.

**Tekniska nevnd 12. oktober 2015:**
Tekniska nevnd metur at eydnast tað at koma nokk so langt við vatnveitingini, os verður neyðugt at prioritera kloakkskipanina. Tað er eisini neyðugt støðugt at asfaltera vegir og gera ábøtur á teir.

**Mentanarnevndin 12. oktober 2015:**
Mentanarnevndin tekur upp ein fund um bara fíggjarætlanina í komandi viku- um ynskir og tílíkt.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2015:**
Fíggjarnevndin mælir til at seta skattaprosentið niður á 22,75, og at barnafrádrátturin verður óbroyttur. Miðast skal eftir at hava ítøkiligt uppskot klár eftir komandi nevndarfundir. Endaligt uppskot skal leggjast fyri býráðið á fundinum í november.

**Havnanevndin 16. november 2015:**
Havnanevndin mælir til at seta kr. 200tús til bátahylin, og kr. 300tús til asfalt.

**Mentanarnevndin 16. november 2015:**
Samtykt at halda fram við somu gjøldum fyri barnaansing. Nevndin tekur upp til viðgerðar á fundinum ið verður um FÆ ynskini frá stovnunum.

**Sosiala nevnd 18. november 2015:**
Semja er um, at øll játtanin til íløgur verður brúkt til umvælingar á heisumiðstøðini.

**Fíggjarnevndin 23. november 2015:**
Einmælt samtykt at leggja seinna uppskot fyri býráðið á fundinum 30. november 2015.

**Vágs Býráð 30. november 2015:**
Seinna uppskot til fíggjarætlan 2016, einmælt samtykt.

## 26/15 Uppskot til eykajáttan 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.11.2015 | 58/15 | 15/00091-28 |
| 2 Vágs Býráð | 30.11.2015 | 26/15 | 15/00091-28 |

Fíggjarleiðarin hevur 16. november 2015 gjørt uppskot til eykajáttan 2015. Víst verður á, at tað bert eri tikin við tey rakstrarstøð har frávikini eru yvir 50 tús.. Yvirlitið er somuleiðis gjørt út frá bókaðum tølum fyri ca. 10 mðr 2015.

Samlaða meirnýtslan er 705.000,00 kr. og verður mælt til at játta hetta av innistandandi.

Broytingar eri bæði á rakstrar- og íløgusíðuni (sí yvirlit dagfest 16. nov. 2015).

**Fíggjarnevndin 23. november 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum, og beina málið í býráðið.

**Vágs Býráð 30. november 2015:**
Einmælt samtykt til fyrru viðgerð.

## 27/15 Fremja endaliga sølu av grundøkið undir bilhúsum í Líðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.11.2015 | 44/15 | 13/00245-11 |
| 2 Vágs Býráð | 30.11.2015 | 27/15 | 13/00245-11 |

Hetta mál hevur sína byrjan í 2012 tá eigararnir av bilhúsinum inni í Líðini vísti áhuga í, at keypa lendi undir bygningunum frá kommununi.
Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi í august 2012 málið um at lata eigararnir á bilhúsunum í Líðini keypa undirlendi, og viðgjørdi nevndin eisini í hesum samband prísin.
Semja var um, at lendi kann seljast fyri kr. 50,00 fyri hvønn fermetur, havandi í huga, at eigararnir sjálvir hava fríðka um økið og sjálvir hava gjørt undirlendi klárt at byggja á.

22. oktober 2012 er skriv sent til eigarar við tilboðið um at keypa ognina, allir hava vent aftur og víst á at hetta hevur teirra áhuga.

22. november hevur kommuna sent fyrispurning til Matrikulstovuna sum sambært deklaratión frá 29. mars 2012 skal geva loyvið til søluna.

Málið er júst avgreitt frá Matrikulstovuni sum ynskir at bilhúsini verða tengd at húsaognum hjá tí einstaka, hetta tí tað ikki skal verða møguligt at selja bert bilhúsini burturfrá.

Fíggjarnevndin og Býráðið verða at taka støðu til hetta og tilmælið um prís frá Teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 23. november 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum, málið verður beint í býráðið.

**Vágs Býráð 30. november 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum. Málið verður avgreitt av umsitingini.

## 28/15 Páls Høll søkir um stuðul til undirlendi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.11.2015 | 55/15 | 15/00250-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.11.2015 | 47/15 | 15/00250-2 |
| 3 Vágs Býráð | 30.11.2015 | 28/15 | 15/00250-2 |

Páls Høll søkir um stuðul til undirlendi ið Vágs Kommuna sendir rokning fyri.

**Mentanarnevndin 16. november 2015:**
Samtykt at stuðla og beina málið í FN.

**Fíggjarnevndin 23. november 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum. Málið verður lagt fyri býráðið.

**Vágs Býráð 30. november 2015:**
Dennis Holm var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan. Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

## 29/15 Nýggj tannlæknaskipan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.11.2015 | 60/15 | 15/00270-2 |
| 2 Vágs Býráð | 30.11.2015 | 29/15 | 15/00270-2 |

Verandi tannlækni fer frá fyri aldur 7. desember 2015.
Kommunan hevur í eitt tíðarskeið verði í samband við privata tannlæknan á staðnum um at yvirtaka uppgávuna, og veita teimum skúlabørnum sum í dag eri í skúlatannlæknaskipanini í Vági tænastuna eftir at skúlatannlæknin fer frá vegna aldur.
Hetta er hon sera sinna fyri, men bíða hevur verði eftir einum sáttmála sum kommunufelagið og tannlæknafelagið hevur arbeitt við. Hetta arbeiðið er ikki komið heilt á mál enn, men eitt fyribils uppskot fyriliggur.
Á seinasta fundi vísti tannlæknin á, at tað fyrsta árið verður møguligt eyka arbeiðið og kundi hon hugsa sær eitt ávíst + gjald fyri at dekka upp fyri hesum, bæði tað digitala arbeiðið sum

skal gerast við at fáa øll børnini inn í teirra skipan, men eisini um okkurt serligt er at gera út yvir tað vanligu røktina.

**Fíggjarnevndin 23. november 2015:**
Einmælt samtykt, at Vágs kommuna ynskir at grunda avtaluna við privata tannlæknan í tráð við tað avtaluna sum Kommunufelgið er í gongd við at gera við tannlæknafelagið.
Um serligar støður íkoma eiga kommunan og privati tannlæknin at loysa hetta sínámillum.

**Vágs Býráð 30. november 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Anna Brattaberg Samuelsen |
| Olgar Mortensen | Dánjal Bjarkhamar | Heri Hjelm |
| Poul W. Augustinussen | Tórður Poulsen | Eyðbritt Krosslá |